gult cyan magenta svart



FISKIVINNUTÍÐINDI

## Gólvuppboðssølan

**Einans 1.164 kilo vórðu seld um gólvsøluna fríggjadagin**

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 205 | GRETA | SNELLA | 67 |
| FD 32 | STAPIN | LÍNA | 128 |
| FD 581 | SIGMUND | LÍNA | 182 |
| FD 720 | GRUNNINGUR | LÍNA | 148 |
| FD 771 | KATRIN | SNELLA | 96 |
| KG 7 | JÁKUP B | LÍNA | 263 |
| TG 607 | NÝBORG | PARTROL | 95 |
| VA 51 | VENUS | LÍNA | 185 |

## Betri ljós gevur fleiri lýs

Norskar royndir sýna, at laksur, sum fær kunstigt ljós er meira lúsaplágaður enn laksur sum bara fær vanligt dagsljós. Royndirnar eru gjørdar av Ernst Morten Hevrøj í SeaGrain og tær sýna at lúsin trívist enn betri hjá fiski sum fær ljós alt samdøgnið.

Eisini dýpið laksurin gongur á hevur týdning fyri lúsapláguna. Laksurin er kannaður á trimum dýpum. 0-4 metur, 4-8 metur og 8-12 metur. Laksurin, sum gekk ovast í sjónum varð meira plágaður av lús, enn laksurin, sum gekk longur niðri, skrivar norska netsíðan Intrafish.no.

– Kunstugt ljós ávirkar eisini hvar fiskurin stendur í ringinum. Hann gongur longur uppi um dagin og fær sostatt fleiri lýs á seg. Móti sumri, tá tíðin er ljósari broytist hetta og tá er gongdin hjá laksinum ikki so nógv ávirkað av um fiskurin fær kunstugt ljós ella ikki.

## Methøgur sildaprísur

Prísurin á sild er methøgur á Møre leiðini í Noregi í løtuni. Miðalprísurin er yvir fýra krónur fyri kiloið og onkur bátur hevur fingið upp til nkr. 4,25 fyri kiloið.

Sølustjórin í Norges Sildelag, Govert Grindhaug hevur ongantíð fyrr upplivað so góðan prís á havsins silvur, sum norðmenn vanliga kalla sildin og nú heldur hann at tíðin er komia at umdoypa hana til havsins gull, skrivar norska netsíðan Interseafood.com.

Sildin verður útflutt so skjótt sum hon er landað og tað eru serliga lond í Eystureuropa, Russlandi og Ukraina sum keypa. Men Japan keypir framvegis ta størstu sildina.

Kvotan hjá norðmonnum eftir vársildin er 30 prosent lægri í ár enn í fjør og hetta saman við at lítið av sild er á goymslu er orsøkin til góða prísin.

Um prísurin á sild fer at halda fram við at hækka vita menn ikki enn.

## Reiðarar ynskja strangari eftirlit

Betri eftirlit umborð við eftirlitsmonnum, einfaldari reglur fyri fiskiskapi er nakað av tí sum Fiskebaatredernes Forbund heldur fer at byrgja fyri ólógligheit og fuski í fiskivinnuni.

Stýrið fyri reiðarafelagnum viðgjørdi á fundi hósdagin uppskotini, sum vinnan sjálv heldur kann hjálpa upp á trupulleikan, skrivar norska útgávan av Interseafood.com

– Vit hava skotið upp nakrar broytingar sum skal gera tað lættari hjá vinnuni og hjá eftirlitsmonnunum, uttan at hetta gongur út yvir at gagnnýta fiskiskapin á burðardyggum støði. sigur Audun Maraak, aðalskrivari í Fiskebaaternes Forbund við NTB. Hann heldur, at torskildu reglurnar eru við til at gera fiskimenn, sum vilja halda lógirnar til lógarbrótarar.

Norski fiskimálaráðharrin Otto Gregussen hevur fyrr biðið vinnuna um eitt útspæl hvussu fiskiveiðulóggávan kann gerast betri.

Omaná at lógin skal gerast betri ynskja reiðararnir fleiri eftirlit, bæði umborð og í samband við landing. Í dag er eftirlitið við landing sera vánaligt, sigur Maraak.

# Upsi á telefonuppboðssøluni

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Av teimum 219 tonsunum, sum vórðu seld yvir telefonuppboðssøluna hjá Fiskamarknaði Føroya mánamorgunin vóru 117 tons upsi. Upsin fór fyri í meðal kr. 5,46 og lækkaði sjálvandi meðaltalið á kiloprísinum fyri samlaðu søluna. Miðalprísurin fyri øll fiskasløg var kr. 12,14.

Átta skip seldu mánamorgunin yvir uppboðssøluna og talan var um góðar sølur. Tey vóru Fram, ið seldi 65 tons fyri kr. 483,410. Havbúgvin 14,4 tons fyri kr. 338,300. Jógvan Norði 6.5 tons fyri kr. 96,450. Research 18,8 tons fyri kr. 377,634. Sardis 9,7 tons fyri kr. 203,582. Skansatangi 20,8 tons kr 392,604. Topas 11,4 tons fyri kr. 240.025. Vestmenningur 71,7 tons fyri kr. 537,457.

Prísurin á toski var í meðal kr 23,30 og fyri hýsu kr. 14,07.

# Vatngóðskan í Føroyum góð

**Lýkur á flestu støðum strangastu ES krøv , vísir ein kanning, sum Rikke Berg Larsen hevur gjørt fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna**

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Tá ið fiskur kemur á eitt fiskavirki, so er vatn tað fyrsta, hann nertir við. Vatnið skal vera reint, tá krøvini eru sera strong til fiskivinnuna. Vatnið skal ikki innihalda smittuberandi bakteriur og tað skal heldur ikki innihalda kemisk eitur evni.

Ein kanning, sum er gjørd av vatninum í Runavík, VEstmanna, Tórshavn, Eiði Tvøroyri og í Klaksvík, vísir at góðskan av vatninum sum heild er góð. Í støðum verður mælt til at reinsa rávatnið við filtrering og við desinfektiuuón. Í Runavík, har ein stórur partur av drekkivatninum kemur úr Toftavatni, verður mælt til, at vatnið umframt at vera filtrera, eisini verður reinsað við klori.

Vatnið er gott ístøðum og vatnið er gott næstan allastaðnu, verður tað reinsað á forsvarligan hátt, vísir hendan kanningin.

Í nøkrum av royndunum vóru bakteriur at finna. Her var mæly til um tað ikki var til at reinsa vatnir, so at finna aðrar keldur til drekkivatn.

# Kappingin um fiskin munandi harðari

**Kreppan í bretska ídnaðinum og avleiðingarnar av henni koma óivað eisini at merkjast í føroysku fiskivinnuni, skrivar Vinnuhúsið**

Skotski fiskiídnaðurin hevur seinnu árini verið í kreppu og hevur tí staðið fyri stórum broytingum. Útlitini fyri komandi árum eru døpur. Seinasta árið eru meira enn 300 starvsfólk í ídnaðinum farin til hús í Norður-Skotlandi og væntandi fara fleiri virkir at steingja í komandi árum. Orsøkin er niðurgongdin í kvotunum á hvítum fiski í Norðsjónum.

Fiskaídnaðurin er sostatt inni í eini tíð við stórum umskipanum. Ein kanning, sum lýsir seinastu 10-20 árini, vísir, at umskipan av vinnuni er farin fram og samlaða talið á fiskavirkjum er farið frá uml. 1000 í 1986 til uml 700 í 1995. Í 2000 vóru 541 fiskavirkir. Veruliga talið á virkjum, sum eru steðgaði upp, er heldur størri enn hetta talið tilsigur, tí í sama tíðarskeiði eru 178 nýggj feløg sett á stovn.

### Størri og færri

Spádómar um framtíðina í skotska fiskaídnaðinum eru, at virkini í framtíðini verða størri og færri. Virkini, sum væntandi fara at yvirliva kreppuna vera tey virkir, sum hava evnir til at endurnýggja seg, menna nýggjar framleiðslur og vørur og virkir, ið eru før fyri skjótt at tillaga seg broytingar í marknaðarviðurskiftum bæði á rávøru og liðugtvørusíðuni.

Verandi virkir í bretska ídnaðinum eru illa skipaði. Virkini eru smá, hava skiftandi tilgongd av rávøru og mangla fíggjarlig og menniskjaliga orku til at menna seg bæði heima og úti.

Av tí, at tað eru fleiri ymisk vinnufeløg, sum vara av fiskaídnaðinum í Bretlandi verður mett, at hesi feløg eru veik og mangla eitt greitt endamál. Úrslitið er, at tekini frá vinnuni sum heild eru sera ymisk og verða sjálvdan hoyrd. Bretski fiskiídnaðurin manglar eina rødd at tala fyri sínum áhugamálum, um lobbyarbeiðið skal gera nakran mun.

### Kappingarfør

Kreppan í bretska ídnaðinum og avleiðingarnar av henni koma óivað eisini at merkjast í føroysku fiskivinnuni. Væntandi verður kappingin um fiskin av føroyskum grunnum munandi harðari í hesum árinum. Ì síðstu vikuni fóru t.d. stórar nøgdir av hýsu óvirkaðar av landinum.

Føroysk virkir hava seinnu árini víst, at tey eru kappingarfør og kunnu gjalda eins høgan prís fyri fiskin, sum útlendsku kappingarneytarnir. Havandi í huga, at ES letur stuðul til útjaðarin, serliga ætla til umskiping av vinnum, er vandi fyri at trýstið á føroyska rávørumarknaðin verður enn størri og at parturin av føroyska tilfeinginum sum fer óvirkað av landinum, fer at økjast munandi, skrivar Vinnuhúsið.

## Nógvir íslendskir trolarar av landinum

Seinastu trý árini eru ikki færri enn 34 íslendskir trolarar seldir av landinum og hetta svarar til eina bruttotonnagu upp á heili 21.000 tons. Millum hesi skip eru nøkur av nýggjastu og bestu fiskiskipum Íslands, skrivar íslendska útgávan av Interseafood.

Í fjør vóru seldir tíggju trolarar av landinum. Føroyingar keyptu í seinastu viku ein av størstu rækjutrolarunum í Íslandi, tað er Ocean Pride, sum kom til Føroya í seinastu viku.

gult cyan magenta svart



# Eitt nýtt slag av tænastu

**Framyvir nýtist ikki virkjum at seta heilt starv av til húsavørð, ella bíða eftir handverkara, um eitthvørt skal gerast. Nú ber nevnliga til at keypa sær rættin til húsarvørð ávíst tímatal um mánaðin**

NÝTT VIRKI
*Jákup Mørk*

Tað eru teir báðir 29 ára gomlu havnarmenninir, Jens Kristian Hansen og Sámal Erik Hentze, sum nú fara undir at bjóða eitt nýtt slag av tænastu út.

Húsavarðartænastan er navnið á virkinum, og tað er júst sum húsavørðar, at teir báðir nú fara at bjóða seg fram. Ikki soleiðis sum vit vanliga skilja hetta, har eitt virki hevur ein fastan húsavørð í starv, men heldur hjá virkjum, har ein ávísur tørvur er á viðlíkahaldi, men har sum hesin ikki er nóg stórur til at seta fólk í fulltíðar starv. Serliga kann hetta hugsast at vera galdandi við bygningum hjá smærri og miðalstórum virkjum. Skulu hesi í dag hava ábøtur ella broytingar gjørdar, og neyðugi førleikin ikki er til staðar ímillum starvsfólkini, er neyðugt at fáa handverkarar at gera arbeiðið, og við tørvinum, sum í dag er á hesum, kann tað ofta taka langa tíð, áðrenn hesir eru tøkir.

### Selja fastar tímar

Henda trupulleika ætla teir báðir at loysa soleiðis, at virki ella privatfólk nú hava møguleika at keypa eitt eftir avtalu ásett tímatal um mánaðin. Keypir kundin t.d. 10 arbeiðstímar um mánaðin, hava teir sostatt hesar arbeiðstímar hjá húsavørðinum um mánaðin. Eisini hava tey ta trygd, at tænastan eisini fevnur um bráðneyðugar ábøtur, soleiðis at til ber at fáa ábøtur gjørdar á miðjari nátt, um tørvur er á tí.

Tænastan leggur seg so eftir at hava eftirlit við, um alt nú er, so sum tað eigur at vera. Skulu vindeygu skiftast, onkur hurð rættast av o.s.fr., er tá ikki neyðugt hjá virkinum at hugsa um hetta, tí tað hava teir húsavørðar til. Møguleiki er so sjálvandi eisini at annað arbeiði verður gjørt, og verður hetta so gjørt sambært avtalu við húsavørðarnar.

Í stuttum siga teir seg átaka sær alt tað vanliga umvælingar- og viðlíkahaldsarbeiði, sum er á vanligum virkjum, soleiðis at tað fyri virkisleiðsluna skal vera so ómaksleyst sum yvirhøvur gjørligt at halda bygningar og annað við líka.

Teir báðir húsavørðarnir, sum báðir hava útbúgving sum bygningssnikkarar, siga annars, at teir sum so eisini átaka sær alt tað vanliga handverkaraarbeiðið, sum fellur undir yrki teirra. Hornasteinurin í virkseminum er tó ætlaður at verða húsavarðartænastan. Báðir eru teir sannførdir um, at við eini slíkari skipan slepst undan, at ov stór útsving eru í virkseminum, og at tað tískil verður munandi lættari at leggja alt virksemi til rættis. Hetta merkir tó ikki, at tað teir bert koma at fáast við húsavarðartænastu. Eins og flestir aðrir innan yrkið, koma teir eisini at fáast við alt vanligt timbur- og snikaraarbeiði, geva tilboð upp á ávís arbeiði, o.s.fr.

At tørvur er á slíkari tænastu eru teir heldur ikki í iva um. Virksemið er sett at byrja 1. mars, men longu nú hava teir verið í sambandi við fleiri virki, og fyrstu sáttmálarnir eru longu komnir undir land.



*1. mars fara teir báðir, Jens Kristian Hansen og Sámal Erik Hentze til verka sum húsavørðar, og báðir ivast teir ikki, at tað fer at bera til at reka nýggja virkið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Mótstøðumenn og viðleikarar

Um teir báðar er annars stutt at siga, at tað helst er frá fótbóltinum, at fólk flest hava borið við navn teirra. Jens Kristian er sum kunnugt liðskipari á bæði B36 og A-landsliðnum, meðan Sámal Erik í fleiri ár hevði týðandi leiklut á miðvøllinum hjá HB. Har hava teir í mong ár verið mótstøðumenn, tá dystir hava verið millum tey bæði havnarliðini, men tað er so ikki bara sum mótstøðumenn, at teir kennast.

Við 14 daga millumbili fóru báðir tveir í læru hjá Havnar Træsmiðju í 1988, haðani teir báðir tóku sveinabræv á heysti 1992. Hetta var annars ikki hin besta tíðin at standa sum nýútlærdur hondverkari, men í fyrstu atløgu sluppu teir báðir kortini at halda fram hjá virkinum.

Síðani hava teir í hvør sínum lag fingist við handverk sítt ymsastaðni í miðstaðarøkinum, men frá 1. mars at rokna, verður tað aftur í felag, at teir báðir húsavørðarnir fara til verka.

# Arsenal dregur



**Júst afturkomin úr Arsenal, hevur Ingi Højsted enn eina ferð fingið boðið venjingaruppihald frá enska stórfelagnum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

15 ára gamli Ingi Højsted úr B36, hevur júst fyri aðru ferð verið á venjingaruppihaldi hjá enska stórfelagnum Arsenal. Í eina viku hevur hann vant við liðnum, umframt at onkur venjingardystur eisini hevur verið á skránni.

Jákup í Stórustovu, leikaraumboðsmaður, sigur við Sosialin, at uppihaldið gekk stak væl, og at Inga stendur í boði at koma yvir aftur til Onglands á páskum. Hetta verður so triðja ferðin, at Ingi vitjar hjá felagnum, so einki er at ivast í, at áhugin fyri fótbóltsevnum hansara er stórur.

### Kendir menn

Tað eru annars kendir menn, sum mann venjarahópin hjá Arsenla.

Høvuðsvenjari, manege, er navnframi Arsene Wenger, og afturaat sær í venjarahópinum hevur hann nøkur av kendastu nøvnunum í bretskum fótbólti.

Liam Brady var í fleiri ár roknaður millum bestu leikararnar í Europa, og fyrrverandi Inter- og Arsenal spælarin hevur í dag ábyrgdina fyri menningini av ungu leikarunum felagsins. Høvuðsvenjari fyri ungdómsdeildina er fyrrverandi enski landsliðsvenjarin, Don Howe, og fyrst og fremst eru tað hesir báðir, sum gera av, hvat víðari skal henda við Inga Højsted.

Alt heta er annars liður í einum miðvísum arbeiði, sum Jákup í Stórustovu hevur framt seinastu tvey árini. Her hava fleiri ungir leikarar fingið møguleikan at royna evni síni uttanlands, og at áhugin fyri evnunum er til staðar, er einki at ivast í, nú fleiri teirra verða bodnir at koma aftur til feløgini, har teir hava verið og vant.

Stuðlar í verkætlanini eru Tryggingarfelagið Føroyar, Føroya Sparikassi, Ísbjørnin, Thomas Dam ítróttur, Atlantic Airways og Kall.

HON & HANN

ENDA-BRESTUR ÷75% t.d.

Harrajakkar fyrr 1.499 kr. Nú 375 kr.

Damu troyggir fyrr 359 kr. Nú 90 kr.

Harratroyggjur frá 599 kr. Nú 150 kr.

Handskar 50 kr.

Húgvur 30 kr.

Hon & Hann
Niels Finsensgøta 10 - Tlf. 31 65 15